# Barna- og útbúgvingarmálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 9. okt. 2023 |
| Mál nr.: | 23/03209 |
| Málsviðgjørt: | EØ |
| Ummælistíð: | 5.-27. okt |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg**
**um**
**Kervi+**

### Brúkarar

**§ 1.** Ásetingarnar í hesi lóg eru galdandi fyri brúkarar av Kervi+ skipanini, ið landsstýrisfólkið varðar av. Kervi+ er almenna talgilda lestrarfyrisitingarskipanin í Føroyum. Ein brúkari fevnir um likamligar og løgfrøðiligar persónar, ið kunnu skráseta og móttaka upplýsingar úr Kervi+. Eftir hesi løgtingslóg er eisini talan um ein brúkara, tá dátuflutningur fer fram.

*Stk. 2.* Landsstýrisfólkið kann gera nærri reglur um brúkarar og atgongd til Kervi+, umframt at gera reglur um dátuflutning.

### Flutningur av upplýsingum

**§ 2.** Um persónupplýsingar, ið eru skrásettar í Kervi+, skulu flytast millum skúlar, krevur hetta loyvi frá skrásetta. Um tann skrásetti er undir 18 ár, krevur hetta loyvi frá persóni sum hevur lut í foreldramyndugleikanum.

*Stk. 2.* Gevur tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, ikki loyvi eftir stk. 1, skal Undirvísingarstýrið partshoyra viðkomandi. Metir Undirvísingarstýrið, at tað er barnsins besta, at móttakandi skúlin fær persónupplýsingarnar, kann Undirvísingarstýrið taka avgerð um, at persónupplýsingarnar verða latnar móttakandi skúlanum.

Stk. 3. Avgerð eftir stk. 2 kann kærast til landsstýrisfólkið innan eina viku eftir, at avgerðin er fráboðað.

*Stk. 4.* Stovnar, ið eftir aðrari lóggávu hava rætt til ávísar upplýsingar, kunnu fáa upplýsingar úr Kervi+ uttan loyvi frá skrásetta ella tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan.

*Stk. 5.* Undirvísingarstýrið hevur heimild at heinta upplýsingar úr Landsfólkayvirlitinum og útflýggja upplýsingarnar umvegis Kervi+.

### Dátuábyrgd

**§ 3.** Undirvísingarstýrið er dátuábyrgdari, tá ið Undirvísingarstýrið nýtir upplýsingar í Kervi+ til egin endamál.

*Stk. 2.* Almenni stovnurin ella løgfrøðiligi persónurin, ið er brúkari av Kervi+, er dátuábyrgdari, tá ið brúkarin nýtir upplýsingar úr Kervi+ til egin endamál. Undirvísingarstýrið er í hesum sambandi dátuviðgeri vegna dátuábyrgdaran.
Stk. 3. Landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur um ábyrgd, uppgávur og eftirlit í sambandi við, at Undirvísingarstýrið viðger persónupplýsingar vegna dátuábyrgdaran, sbrt. stk. 2.

**Umsiting**

**§ 4.** Undirvísingarstýrið kann nýta persónupplýsingar í Kervi+ til umsiting av Kervi+, umsiting av skúlum, eftirlit, v.m.
*Stk. 2.* Landsstýrisfólkið kann gera nærri reglur eftir stk. 1.

**Gildiskoma**

**§ 5.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Ein nýggj heildarætlan fyri KT-umsiting í undirvísingarverkinum var løgd fram og handað tann 4. septembur 2020 av táverandi landsstýrismanni. Tann 23. apríl 2021 samtykti Løgtingið, at heildarætlanin skuldi fremjast. Ein av høvuðstættunum vóru at menna eina lestrarfyrisitingarskipan til m.a. fólkaskúlar, miðnámsskúlar, maritimar útbúgvingarstovnar, Heilsuskúlan (heilsuhjálpara- og heilsurøktaraútbúgving) og Fróðskaparsetrið (hægri útbúgvingar). Henda føroyska lestrarfyrisitingarskipan hevur fingið heitið Kervi+.

Endamálið er m.a. at veita eina KT-skipan, ið er trygg at brúka, ið skal tryggja, at persónupplýsingar eru væl vardir og sum ikki kunnu koma óviðkomandi í hendi. Kervi+ tryggjar, at brúkarin tøkniliga og í aðrar mátar fær eina haldgóða og burðardygga loysn. Harumframt hevur Kervi+ til endamáls at hjálpa skúlum og stovnum at skipa virksemi og tilfeingi. Í høvuðsheitum fevnir hetta um upptøku, ráðlegging og skráseting av undirvísingarvirksemi, eftirmetingar, próvtøkur, leiðslukunning, o.a.

Formliga er tað landsstýrisfólkið, ið er *eigari* av skipanini, meðan dagliga ábyrgdin og umsitingin av skipanini verður latin Undirvísingarstýrið at umsita.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Tað finst ongin lóggáva á økinum í dag.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við lógaruppskotinum er, at áseta yvirskipaðu rammurnar fyri nýtslu av upplýsingum úr Kervi+, og at áseta heimildir til at umsita Kervi+, samstundis sum Kervi+ við lógini verður viðurkent sum almenna talgilda lestrarfyrisitingarskipanin í Føroyum.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Við lógaruppskotinum verður tað ásett, hvør skal hava atgongd til Kervi+, hvussu flutningur av upplýsingum skal fara fram, dátuábyrgd og yvirskipaðar heimildir til at umsita Kervi+.

Mett verður, at tað er ein fyrimunur at áseta nakrar yvirskipaðar rammur fyri Kervi+ og umsitingina av skipanini, umframt at nágreina ávís viðurskifti, ið annars kunnu elva til iva.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Lógaruppskotið hevur verið til ummælis á hoyringarportalinum hjá Barna- og útbúgvingarmálaráðnum frá 9. Oktober – 27. Oktober 2023.

Hesi hava eisini havt lógaruppskotið til hoyringar: Undirvísingarstýrið, NÁM, Hagstovan, Fróðskaparsetur Føroya, Dátueftirlitið, Yrkisdepilin, Heilsuskúlin, Landsfólkayvirlitið, Familjufyrisitingin, Føroya Lærarafelag, Pedagogfelagið, Felagið Maskimeistaralærarar, Fakfelag Sjómansskúlalærara í Føroyum, Yrkisfelagið Miðnám, umframt øll aðalráðini.

Hoyringsfreistin var tann 27. Oktober 2023

Ummæli eru komin frá: X, X og X.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Tað eru KT-skipanir, sum eru í rakstri í dag, sum Kervi+ fer at avloysa. Verandi KT-umsitingarskipanir, eitt nú verandi Kervi, Tímaglasið, Próvbókin hjá Setrinum og aðrar skipanir, hava útreiðslur við sær til rakstur, umsiting, einkarloyvi (licensir), o.s.fr.

Tá ið Kervi+ er liðugt ment og verksett, verður tørvur á fígging til framhaldandi rakstur og viðlíkahald. Væntast kann, at framhaldandi rakstrar- og viðlíkahaldsútreiðslur (tó ikki víðarimenning) kunnu fíggjast av umskipanum í verandi KT-loysnum og fyriskipanarligum bygnaðum, á tann hátt, at kostnaðurin fyri verandi KT-skipanum og umsitingina av teimum, í staðin verður goldin til Kervi+, tá ið Kervi+ verður verksett og avloysir aðrar KT-skipanir. Á tann hátt fer Kervi+ væntandi ikki at kosta meira, enn verandi KT-skipanir kosta landinum í dag í rakstri.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Kervi+ skal gera tað lættari, skjótari og smidligari hjá útbúgvingarstovnunum at umsita undirvísingaverkið. Fyri at tryggja effektivisering av umsitingina, hava allir áhugapartar samstarva um skipanina. Veitarin hevur sostatt ment skipanina til brúkaran, saman við brúkaranum.

Effektiviseringin á samlaða økinum merkir, at orka kann frígevast hjá skúlunum og útbúgvingarstovnunum, og í staðin brúkast uppá meira týðandi námsfrøðiligar uppgávur. Talan verður um minni umsiting hjá skúlum og útbúgvingarstovnum, og hevur tað tí m.a. við sær betri grundarlag undir at menna góðskuna av útbúgvingunum.

Lógaruppskotið hevur við sær, at umsitingin av Kervi+ verður miðsavnað í Undirvísingarstýrinum. Lógaruppskotið hevur tí umsitingarligar avleiðingar fyri Undirvísingarstýrið (landið). Ætlanin er eisini, at hagtøl skulu gerast og brúkast í størri mun enn í dag, og fer hetta tí eisini at fylla meira í umsitingini. Tað krevur ikki lógarheimild, at gera hagtøl. Undirvísingarstýrið kann tí nýta persónupplýsingar í Kervi+ til at gera hagtøl. Heldur ikki er krav um heimild fyri at almannakunngera hagtøl. Tó er krav sambært dátuverndarlógini, at tað ikki ber til at eyðmerkja persónar út frá hagtølunum. Dátuverndarlógin ásetir, at seinni viðgerð av persónupplýsingunum, enn upprunaliga endamálið, kann fara fram við søguligum, hagfrøðiligum ella vísindaligum endamáli (§ 7, stk. 3 í dátuverndarlógini). Eisini tá ið talan er um viðkvæmar persónupplýsingar (§ 18 í dátuverndarlógini). Hagtøl eru sera avgerandi, og ein fortreyt, tá talan er um at at betra dygdina á økinum (umsitingina, menningina og ráðleggingina), og við Kervi+ ber til at savna hesar upplýsingar saman og fáa eina betri heildarmynd av undirvísingarverkinum og sum liður í eftirlitinum.

Umsitingarligar avleiðingar kunnu vera, um ein útbúgvingarstovnur ikki er partur av Skúlanet. Skúlanet er eitt nýtt undirstøðukervi, har allar tænastur og veitingar til brúkarar verða skipaðar (Skúlanet), ið er tøkt fyri skúlarnar. Skúlanet er ein veiting frá KT-Landsins, sum er skipað á Gjaldstovuni. Tað er hvør kommuna sær, ið ger av, hvørt hon ynskir at gerast partur av Skúlanet. Við innliman í Skúlanet fylgja m.a. hesar tænastur: veiting av teldum, ið eru útgjørdar við øllum neyðugu trygdarhentleikum, eitt trygt net, trygga hýsing, journalskipan, dagliga

brúkaraumsiting og KT-hjálp. Harumframt veitir Skúlanet ein KT-trygdarpakka, ið er í samsvari við dátuverndarlógini og (sum nú er) ISO/IEC 27001/27002. Við hesum fáa skúlar og stovnar eina árliga trygdarfrásøgn, ið byggir á KT-grannskoðanarváttanir og innanhýsis skoðan.

Um man er dátuábyrgdari eftir dátuverndarlógini, er eitt krav m.a. eitt nøktandi trygdarstøði. Sum ásett í § 3, stk. 2 í hesum lógaruppskoti, er almenni stovnurin (t.d. skúlin) dátuábyrgdari fyri tær persónupplýsingar, ið viðkomandi skrásetur í Kervi+. Stovnar, ið ikki eru partar av Skúlanet, skulu kunna vísa á, at teir hava eitt nøktandi KT-trygdarstøði.

Ávísir skúlar hoyra undir § 7 í rundskriv um KT-trygd (stovnar við serliga týðandi upplýsingum). Hetta eru skúlar, ið goyma prógv. Av tí at prógv frameftir fara at liggja í Kervi+, fara hesir skúlar at spara fíggjarliga og umsitingarliga, tá ið Kervi+ verður verksett fyri teir.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Lógaruppskotið hevur jaligar avleiðingar fyri vinnuna. Tað eru fólk úr vinnuni, ið hava neyðugu førleikarnir, sum hava ment Kervi+, og somuleiðis verða tað fólk úr vinnuni, ið skulu taka sær av rakstrinum og víðari menning av Kervi+.

Hin vegin verða tað aðrir veitarar, sum ikki framhaldandi skulu veita tær skipanir, sum teir gera í dag. Hetta vegna, at Kervi+ fer at avloysa hesar skipanir.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar og felagsskapir.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Tað eru ikki millumtjóðasáttmálar á økinum, ið lógaruppskotið fevnir um.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Tað eru ikki tvørgangandi millumtjóðasáttmálar á økinum, ið lógaruppskotið fevnir um.

1) **Hoyvíkssáttmálin**
   Hoyvíkssáttmálin er ikki viðkomandi fyri lógaruppskotið.

2) **Evropeiski mannarættindasáttmálan, EMRS**
   Evropeiski mannarættindasáttmálin er ikki viðkomandi fyri lógaruppskotið.

3) **Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**

Sáttmálin er ikki viðkomandi fyri lógaruppskotið.

**2.9. Markaforðingar**
Mett verður ikki, at lógaruppskotið elvir til markaforðingar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið inniheldur ikki ásetingar um skattir og avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ikki við sær ávís gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Ásett verður í § 1, stk. 2, at landsstýrisfólkið kann gera nærri reglur um brúkarar og atgongd til Kervi+, umframt at gera reglur um dátuflutning. Talan er um dátuflutning, tá integratión verður gjørd millum Kervi+ og aðrar KT-skipanir, harvið at ávísir upplýsingar verða deildir sjálvvirkandi.

Í § 3, stk. 3 verður ásett, at landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur um ábyrgd, uppgávur og eftirlit í sambandi við, at Undirvísingarstýrið viðgerð persónupplýsingar vegna dátuábyrgdaran, sbrt. stk. 1. Henda áseting kann brúkast til at gera reglur, ið hava við sær, at tað ikki er neyðugt at gera einstakar dátuviðgerðaravtalur við allir brúkarar (skúlar og stovnar) av Kervi+. Ein kunngerð kann gerast í staðin, ið setur somu krøv til partarnar, sum ein dátuviðgerðaravtala hevði gjørt.

Eftir § 4, stk. 2, kann landsstýrisfólkið gera nærri reglur eftir stk. 1, ið ásetir, at Undirvísingarstýrið kann nýta persónupplýsingar í Kervi+ til umsiting av skúlunum, eftirlit, v.m. Eisini kann landsstýrisfólkið gera nærri reglur um hagtøl.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

## 2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### Til § 1

*Til stk. 1.*
Við lógaruppskotinum verður Kervi+ viðurkent sum almenna talgilda lestrarfyrisitingar-skipanin í Føroyum.

Lógin er galdandi fyri brúkarar av Kervi+. Ein *brúkari* fevnir bæði um ein, sum hevur atgongd til at fara inn í Kervi+ at skráseta upplýsingar, at móttaka upplýsingar, og fevnir eisini um, tá ið ein integratión millum Kervi+ og aðrar skipanir verður gjørd, harvið at dátuflutningur fer fram.

Brúkararnir av skipanini kunnu m.a. verða næmingar, tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, skúlarnir og avvarðandi myndugleikar. Avvarðandi myndugleikar kunnu m.a. verða aðalráðið, Undirvísingarstýrið, kommunurnar, Studni, Yrkisdepilin, v.m.

*Til stk. 2.*
Landsstýrisfólkið hevur heimild til at gera nærri reglur um brúkarar og atgongd til Kervi+. Í viðmerkingunum til stk. 1 er ásett, hvørjir brúkararnir av skipanini í høvuðsheitum eru. Heimildin í stk. 2 kann m.a. nýtast til at áseta greiniligari reglur um, hvør, umframt teimum í viðmerkingini til stk. 1 nevndu, kunnu gerast brúkarar, hvussu nógvir brúkarar ein skal hava, um ein persónur t.d. starvast í fleiri skúlum, hvussu brúkarin skal skipast, um eitt starvsfólk á einum skúla fær upplýsingar um næmingar frá øðrum skúlum (t.d. gjøgnum førleikastovur), hvør skal hava eina atgongd til at 'lesa' upplýsingar úr skipanini, o.s.fr.. Harumframt kann landsstýrisfólkið m.a. brúka heimildina til at áseta, at landsstýrisfólkið ella Undirvísingarstýrið

góðkennir nýggir brúkarar og atgongd, m.a. 'lesiatgongd', til skipanina. Atgongd skal einans tillutast, um talan er um eitt ítøkiligt, sakligt og neyðugt endamál hjá móttakaranum ella nýggja brúkaranum.

Landsstýrisfólkið er eisini heimilaður at áseta nærri reglur um dátuflutning. Ymsir myndugleikar hava heimild at fáa ávísar upplýsingar frá øðrum myndugleikum. Í staðin fyri at hesir myndugleikar skulu fáa ein log-in brúkara til Kervi+, og manuelt skula inn í Kervi+ og leita sær eftir neyðugu upplýsingunum, verða tað gjørdar integratiónir millum Kervi+ og aðrar skipanir, harvið at ávísar upplýsingar sjálvvirkandi verða latnar myndugleikum, ið hava heimild at fáa upplýsingarnar. Eitt dømi um eina skipan, ið hevur integratiónir við aðrar skipanir í dag er t.d. Landsfólkayvirlitið (FOLK), har tað er gjørd ein integratión við ymsar aðrar skipanir, har upplýsingarnar sjálvvirkandi verða skrásettar í skipanir hjá øðrum myndugleikum. Heimildin í stk. 2 kann nýtast til at áseta greiniligari reglur fyri dátuflutning (integratiónir) millum Kervi+ og aðrar skipanir.

Ein myndugleiki, ið ger av til hvørjum endamáli persónupplýsingar skulu viðgerast, er dátuábyrgdari. Tann myndugleikin, ið er dátuábyrgdari, hevur ábyrgdina av at vísa á, at myndugleikin hevur heimild at fáa upplýsingarnar ella eitt sakligt og neyðugt endamál við at fáa upplýsingarnar. Broytist reglugerðin ella heimildirnar hjá myndugleikanum, t.d. at fáa ávísar upplýsingar, hevur myndugleikin eina fráboðanarskyldu yvir fyri landsstýrisfólkinum og Undirvísingarstýrinum. Ein broyting í heimildunum kann hava við sær, at integratiónin millum Kervi+ og aðrar skipanir antin skal broytast ella at integratiónin skal strikast, ella at ein brúkari skal strikast ella tillagast.

**Til § 2**
*Til stk. 1.*
Ásett verður, at um persónupplýsingar skulu flytast millum skúlar, skal tann skrásetti loyva hetta. Er tann skrásetti undir 18 ár, skal loyvi fáast til vega frá persóni sum hevur lut í foreldramyndugleikanum. Har talan er um felags foreldramyndugleika, er nokk við loyvi frá tí eina persóni við foreldramyndugleika. Ásetingin er bæði galdandi, tá ið talan er um vanligar og viðkvæmar persónupplýsingar.

Talan er ikki um eitt samtykki eftir § 6, nr. 10 í løgtingslóg nr. 80 frá 7. Juni 2020 um vernd av persónupplýsingum (hereftir dátuverndarlógin). Sambært § 9, stk. 3 í dátuverndarlógini um samtykki, skal skrásetti til eina og hvørja tíð kunna taka sítt samtykki aftur. Hetta kunnu myndugleikar í Føroyum ikki liva upp til í roynd og veru í skrivandi stund. Almennir stovnar hava journaliseringsskyldu. Harumframt mugu almennir stovnar ikki strika upplýsingar uttan heimild frá Tjóðskjalasavninum (áður Føroya Landsskjalasavn), sbrt. § 5, stk. 1 í kunngerð nr. 117 frá 5. Juli 1995 um almenn savnindi og virksemið hjá Føroya Landsskjalasavni. Er talan tí um upplýsingar, ið ein myndugleiki hevur skyldu at skriva niður og journalisera, kunnu upplýsingarnar ikki strikast, um tann skrásetti biður um, at myndugleikin strikar upplýsingarnar. Fyri ikki at áseta nakað, sum myndugleikar í roynd og veru ikki kunnu liva upp til, verður *loyvi* nýtt í staðin fyri *samtykki*. Munurin á loyvi og samtykki er harafturat, hvussu fyrispurningurin kann setast upp. Munur er eisini á, hvussu ítøkiligt og greitt svarið skal verða frá skrásetta.

Verður loyvi givið, ella hevur Undirvísingarstýrið sbrt. § 2, stk. 2 í hesum lógaruppskotið tikið avgerð um, at upplýsingar skulu latast einum øðrum skúla, er talan um, at viðgerðin av

viðkvomum persónupplýsingunum hevur sína viðgerarheimild í § 12, stk. 1, nr. 2 í dátuverndarlógini, harvið at viðgerin er heimilað í lóg.

*Til stk. 2.*
Um ein næmingur skiftir skúla, er útgangsstøði, at persónupplýsingar ikki sjálvvirkandi verða latnar móttakandi skúlanum. Talan er um tveir sjálvstøðugir stovnar, og upplýsingar kunnu einans latast einum øðrum myndugleika, um heimild er hesum viðvíkjandi (t.d. í dátuverndarlógini ella í aðrari løggávu).

Tað er sera týdningarmikið fyri barninum, at ávísar upplýsingar fylgja barninum. Hetta m.a. fyri, at móttakandi skúlin kann geva barninum tær best møguligu umstøðurnar, og fyri at lofta tí tørvinum, sum barnið hevur. Skúlar í dag tosa ikki nóg væl saman, áðrenn eitt barn flytur skúla. Í summum førum kunnu teir ikki tosa saman, t.d. um serligan tørv og heilsuviðurskifti, sum eru viðkvæmar upplýsingar, uttan at tann ella tey, sum hava foreldramyndugleikan, samtykkja til tess, sbrt. § 12 í dátuverndarlógini. Hetta hevur við sær, at børn ikki verða loftaði eins væl, og tey kundu verið, um skúlarnir høvdu allar neyðugar upplýsingar.

Er talan um serligan tørv, skal skjalprógv fyri evt. útgreiningar, diagnosur, v.m. fyriliggja, fyri at skúlin kann geva neyðuga stuðulin ella veita neyðuga hjálp ella hjálparamboð. Í slíkum førum er tað av stórum týdningi, at móttakandi skúlin fær upplýsingar frá fyrrverandi skúlanum (skúlin, sum barnið flytur úr). Talan kann t.d. eisini vera um serligar umstøður í fyrrverandi skúlanum, ið fyrrverandi skúlin metir, at móttakandi skúlin eigur at fáa upplýst, fyri at móttakandi skúlin kann lofta barninum.

Við hesum uppskotið til áseting verður virkað fyri barnsins besta, m.a. at barnsins tørvur verður møttur. Hóast at hvør skúli sær er sín egni stovnur, so er undirvísingargongdin ein samlað gongd, ið skal hanga saman og tryggja, at barnið fær skipaða undirvísing í 9 ár, og kann nema sær kunnleika, fimi, arbeiðshættir og málbúnar, sum stuðla tí einstaka næminginum í fjølbroyttu, persónligu menningini, sbrt. § 2, stk. 1 í løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 85 frá 16. mai 2022. Hetta óheft av, hvar barnið gongur í skúla. Undirvísingin má skipast til tann einstaka næmingin, og hetta er einans møguligt, um skúlin hevur allar neyðugar upplýsingar. Av tí at allar neyðugar upplýsingar fara at liggja í Kervi+, er skynsamt at regulera økið, og hava ásetingar um, hvussu skúlar kunnu flyta upplýsingar ímillum sín.

Við hesum uppskotið verður útgangsstøðið, at fyrrverandi skúlin er tann, ið á fyrsta sinni má meta, um skúlin hevur skrásett upplýsingar, sum skúlin metur, at ein móttakandi skúli eigur at fáa. Metir fyrrverandi skúlin, at móttakandi skúlin eigur at fáa ávísar upplýsingar, skal fyrrverandi skúlin biðja skrásetta um loyvi. Er skrásetti undir 18 ár, er tað tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, ið skulu loyva, at upplýsingar um barnið verða latnar móttakandi skúlanum. Noktar tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, at upplýsingarnar verða latnar móttakandi skúlanum eftir § 2, stk. 1 í hesum lógaruppskoti, skal fyrrverandi skúlin venda sær til Undirvísingarstýrið, og lýsa málið. Metir fyrrverandi skúlin ikki, at tað eru upplýsingar, ið móttakandi skúlin skal hava, so er útgangsstøði, at upplýsingar ikki verða latnar víðari og tað er ikki neyðugt at biðja tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan, um loyvi.

Upplýsa tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, við byrjan á einum móttakandi skúla um viðurskifti, ið hava gjørt seg galdandi á fyrrverandi skúlanum ella viðurskifti, sum skúlin metir hava gjørt seg galdandi á fyrrverandi skúlanum, hóast móttakandi skúlin ikki hevur fingið kunning frá fyrrverandi skúlanum, so kann móttakandi skúlin biðja um loyvi frá tí ella teimum,

ið hava foreldramyndugleikan, til at biðja fyrrverandi skúlan um upplýsingar um hesi viðurskifti. Geva foreldrini loyvi, skal fyrrverandi skúlin lata móttakandi skúlanum upplýsingarnar. Geva foreldrini (ella bara tað eina) ikki loyvi, skal skúlin venda sær til Undirvísingarstýrið og lýsa málið.

Um einki loyvi fæst frá persóni sum hevur lut í eftir stk. 1, skal Undirvísingarstýrið partshoyra tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan. Undirvísingarstýrið skal síðani meta, um persónupplýsingar skulu latast móttakandi skúlanum. Í metingini skal Undirvísingarstýrið, umframt frágreiðingini frá tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan, m.a. taka atlit til barnsins tørv, áhugamál, læring, heilsu, hvørjar persónupplýsingar talan er um, umframt at taka atlit til, hvat skal til fyri at tryggja trivnaðin. Barnið skal verða loftað og møtt har sum tað er, og fáa neyðugu hjálpina.

Undirvísingarstýrið skal tryggja sær, at skikkað starvsfólk, sum t.d. fulltrúi innan økið, viðgera málið og taka avgerð í málinum. Í summum førum kann vera neyðugt, at leita sær ráðgeving hjá serfrøðingum á økinum, t.d. Sernám og evt. barnaverndina. Í serligum førum kann tað eisini verða neyðugt at partshoyra barnið.

Metir Undirvísingarstýrið, at persónupplýsingarnar, við atliti at barnsins besta, eiga at latast móttakandi skúlanum, so kann Undirvísingarstýrið taka avgerð um, at móttakandi skúlin skal fáa persónupplýsingarnar. Um Undirvísingarstýrið tekur avgerð um, at persónupplýsingar skulu latast móttakandi skúlanum, er talan er um eina fyrisitingarliga avgerð.

Í summum førum verða ávísar upplýsingar (t.d. viðkvæmar upplýsingar), ikki skrásettar beinleiðis í Kervi+, men í eini skjalføringarskipan, sum verður knýtt at Kervi+. Hesar upplýsingar, ið eru skrásettar í skjalføringarskipanini, skulu eisini latast víðari til tann móttakandi skúlan, um tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, loyva tí, ella um Undirvísingarstýrið hevur tikið avgerð um tað.

Vísast kann á, at tað í dag eru ásetingar í aðrar lóggávur, ið á ávísum punktum eru sambæriligar við § 2, stk. 2 í hesum lógaruppskoti ella sum leggja upp til okkurt líknandi. Eitt dømi er § 19 í passkunngerðini (kunngerð nr. 994 frá 11. Oktobur 2012 for Færøerne om pas, m.v.). Útgangsstøði er, at tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, skulu samtykkja, áðrenn løgreglan kann gera eitt pass, sbrt. § 19, stk. 1 í passkunngerðini. Er talan um felags foreldramyndugleika, er tað nóg mikið, at tann eini, ið hevur foreldramyndugleika, skrivar undir, um hin, ið hevur foreldramyndugleikan, vegna fráveru, sjúku ella annað, er forðaður í at samtykkja, sbrt. § 19, stk. 2. Løgreglan kann tó loyva, at eitt pass verður gjørt uttan samtykki eftir § 19, stk. 1 og 2 (t.v.s. uttan samtykki frá nøkrum av teimum, ið hava foreldramyndugleikan), tá serligar umstøður tala fyri, at geva barninum eitt pass, sbrt. § 19, stk. 3 í passkunngerðini. Í § 2, stk. 3 í hesum lógaruppskotið, er ásett, at ein avgerð um, at upplýsingar skulu latast einum øðrum skúla, kann kærast til landsstýrisfólkið. Slík áseting er ikki í passkunngerðini og løgreglan hevur tí endaliga avgerðarrættin. Mett verður, at tað skal vera møguligt at kæra eftir hesum lógaruppskoti.

Mett verður, at § 2, stk. 2 er í trá við § 27, stk. 2 og 3 í fyrisitingarlógini. Sambært § 27, stk. 2, kunnu tær í stk. 1 nevndu upplýsingar (trúnaðarupplýsingar og heilt privat viðurskifti hjá einstaklingum) latast víðari til annan fyrisitingarmyndugleika tá: 1) hann, sum upplýsingin viðvíkur, hevur givið samtykki, 2) tað fylgir av lóg ella ásetingum við heimild í lóg, at upplýsingin skal latast víðari, 3) upplýsingin verður latin víðari fyri at røkja privat ella almenn áhugamál, sum greitt fara fram um fyrilitið fyri teimum áhugamálum, ið geva grund fyri dyljan,

herundir umhugsni honum, sum upplýsingin viðvíkur, ella 4) tað er ein neyðugur liður í viðgerðini av málinum, at upplýsingin verður latin víðari, ella tað er neyðugt fyri at ein myndugleiki kann fremja eftirlits- ella umsjónaruppgávur. Eftir § 27, stk. 3 kunnu aðrar trúnaðarupplýsingar, umframt tær í stk. 2 nevndu, bert latast víðari til annan fyrisitingar-myndugleika, tá tað má metast, at upplýsingin er av stórum týdningi fyri virksemið hjá myndugleikanum ella fyri eina avgerð, sum myndugleikin skal taka.

Sambært § 46, stk. 2 í løgtingslóg nr. 18 frá 8. Mars 2005 um barnavernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 32 frá 9. Mars 2023 (hereftir barnaverndarlógin), skulu upplýsingar um mál í størst møguligan mun innheintast í samstarvið við tann, ið málið snýr seg um. Tað er ásett í § 46, stk. 2, at starvsfólk innan tað almenna og onnur, sum í starvi sínum hava kunnleika til mál, ið verða viðgjørd sambært lógini, hava skyldu at lata upplýsingar, sum viðvíkja málinum, til barnaverndarumsitingina, um barnaverndarumsitingin krevur tað. Við § 2, stk. 2 í lógaruppskotinum hevur fyrrverandi skúlin skyldu til at lata móttakandi skúlanum upplýsingar, um foreldrini hava givið loyvi ella um Undirvísingarstýrið hevur tikið avgerð hesum viðvíkjandi.

*Til stk. 3.*
Um Undirvísingarstýrið tekur avgerð eftir stk. 2 um, at persónupplýsingar skulu latast einum øðrum skúla, er talan um eina fyrisitingarliga avgerð. Avgerðin kann kærast til landsstýrisfólkið innan eina viku, rokna frá tí degi avgerðin er tikin. Viðvíkjandi kæru er útgangsstøði, at ein kæra ikki hevur steðgandi virkna. Um persónupplýsingar tí fyrst verða latnar einum øðrum skúla, hevur skúlin skyldu at skráseta upplýsingarnar, um upplýsingarnar eru liðir í einari fyrisitingarliga málsviðgerð og hava týdning fyri eitt mál ella eina avgerð. Skúlin má tá ikki strika upplýsingarnar, tí hetta krevur heimild frá Tjóðskjalasavninum, sbrt. § 5, stk. 1 í kunngerð nr. 117 frá 5. Juli 1995 um almenn savnindi og virksemið hjá Føroya Landsskjalasavni.

Fyri at barnið ikki skal líða undir, at ein móttakandi skúli ikki kann fáa upplýsingarnar fyrr enn ein evt. kærufreist er farin, er kærufreistin ásett soleiðis, at móttakandi skúlin kann fáa neyðugar upplýsingar skjótast gjørligt.

*Til stk. 4.*
Ávísir almennir stovnar hava sambært lóg heimild at fáa upplýsingar frá øðrum myndugleikum. T.d. hevur Studni sambært § 23, stk. 1 í løgtingslóg nr. 36 frá 3. Mai 2007 um lestrarstuðul (sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 159 frá 10. Desembur 2021), heimild til at fáa tær upplýsingar um umsøkjarar frá almennum myndugleikum, ið eru neyðugar fyri at útrokna/játta stuðulin og innkrevja lán. Hetta kann t.d. verða frá Landsfólkayvirlitinum, Almannaverkinum, útbúgvingarstovnum, o.s.fr. Eisini kann talan verða um, at ein stovnur hevur heimild eftir dátuverndarlógini, at viðgera ávísar upplýsingar (t.v.s. at stovnurin líkur meginreglurnar og hevur viðgerðarheimild sambært dátuverndarlógina). Í slíkum førum er ikki neyðugt við loyvi frá skrásetta, ella tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan, fyri at fáa hesar upplýsingar. Tað er tá heimild fyri, at upplýsingarnar verða latnar víðari.

*Til stk. 5:*
Við hesum verður heimild fingin til vegar at heinta upplýsingar úr Landsfólkayvirlitinum og at útflýggja hesar upplýsingar umvegis Kervi+.

Almennir myndugleikar, ið hava fyri neyðini at fáa upplýsingar úr Landsfólkayvirlitinum, kunnu útvega sær hesar upplýsingar, sbrt. § 29, stk. 1 í løgtingslóg nr. 41 frá 8. Mai 2007 um fólkayvirlit, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 91 frá 7. Juni 2020 (hereftir lóg um fólkayvirlit). Eftir § 31, stk. 1 í lóg um fólkayvirlit, hava myndugleikar einans heimild at lata hesar upplýsingar víðari til aðrar almennar myndugleikar, tá hetta er heimilað í lóg, ella tá ið Innlendismálaráðið (nú Løgmálaráðið) hevur givið loyvi til tess.

Ein integratión millum Kervi+ og Landsfólkayvirlitið verður gjørd, harvið at Kervi+ fer at heinta upplýsingar úr Landsfólkayvirlitinum. Í samband við innskriving í skúlum, mugu skúlar, og møguliga aðrir stovnar, fáa útflýggja hesar upplýsingar. Av tí at Kervi+ fer at innihalda hesar upplýsingar, er skynsamt, at allir skúlar kunnu fáa hesar upplýsingar beinleiðis úr Kervi+, í staðin fyri at skúlarnir hvør sær venda sær til Landsfólkayvirlitið.

Við hesari áseting er heimild tí fingin til vegar fyri at upplýsingarnar bæði kunnu heintast úr Landsfólkayvirlitinum, og fyri at kunna útflýggja hesar upplýsingar úr Kervi+ til skúlar og stovnar.

**Til § 3**

*Til stk. 1.*

Ásett verður, at Undirvísingarstýrið er dátuábyrgdari, tá ið Undirvísingarstýrið nýtir upplýsingar í Kervi+ til egin endamál, t.v.s. tá Undirvísingarstýrið ger av, til hvørji endamál og við hvørjum hjálpitólum persónupplýsingar í Kervi+ kunnu viðgerast.

Hugtakið *dátuábyrgdari* skal skiljast í samsvari við § 6, nr. 6 í dátuverndarlógini.

*Til stk. 2*

Almenni stovnurin ella løgfrøðiligi persónurin, ið er brúkari av Kervi+, er dátuábyrgdari, tá ið brúkarin nýtir upplýsingar úr Kervi+ til egin endamál. Í hesum sambandi er Undirvísingarstýrið dátuviðgeri vegna dátuábyrgdaran.

Hugtakið *dátuviðgeri* skal skiljast í samsvari við § 6, nr. 7 í dátuverndarlógini.

*Til stk. 3*

Ásetingin heimilar landsstýrisfólkinum at áseta reglur um ábyrgd, uppgávur og eftirlit í sambandi við, at landsstýrisfólkið viðgerð persónupplýsingar vegna dátuábyrgdaran, sbrt. stk. 2.

Í § 41, stk. 2 í dátuverndarlógini er ásett, at viðgerðin hjá einum dátuviðgera skal vera grundað á avtalu, sum er bindandi, og sum m.a. ásetir evnið fyri viðgerðini, endamál, eins og skyldur og rættindi hjá dátuábyrgdaranum. Í viðmerkingunum til § 41, stk. 2 í dátuverndarlógini stendur, "*at tá ein dátuviðgeri viðger persónupplýsingar fyri ein dátuábyrgdara, skal hetta vera gjørt sambært bindandi avtalu ella øðrum rættarligum skjali*".

Endamálið við § 3, stk. 3 í hesum lógaruppskoti er, at heimila landsstýrisfólkinum at áseta reglur, ið innihaldsliga lúka krøvini til eina dátuviðgerðaravtalu og eru bindandi fyri partarnar. Tá slík kunngerð er sett í gildi, er ikki neyðugt at hava dátuviðgeraravtalur við hvønn einstakan Kervi+ brúkara (skúlar og stovnar). Í staðin kann vísast til kunngerðina við heimild í hesi grein.

**Til § 4**
*Til stk. 1*
Landsstýrisfólkið í skúlamálum hevur í delegatiónsskrivið (seinasta dagfesting tann 25. Novembur 2019) latið Undirvísingarstýrinum heimildir, at útinna sína vegna. Umframt ítøkiligu lógarásettu heimildirnar, hevur landsstýrisfólkið eisini lagt til Undirvísingarstýrið at hava eftirlit við útbúgvingarstovnum, ið hoyra undir málsræðið hjá landsstýrisfólkinum. Eisini kann Undirvísingarstýrið geva ávísum stovnum tænastuboð. Hetta merkir, at teir í delegatiónsskrivinum til eina og hvørja tíð nevndu útbúgvingarstovnarnir vísa til Undirvísingarstýrið, heldur enn beinleiðis til ráðið.

Undirvísingarstýrið umsitur í verandi stund fólkaskúlan, miðnámsskúlar, maritimar skúlar og aðrir skúlar, og tekur sær av fyrisitingarligar rakstraruppgávur í undirvísingarverkinum. Landsstýrisfólkið í skúlamálum kann til eina og hvørja tíð broyta dagføra delegatiónsskrivið og broytingar kunnu tí koma í.

Fyri at kunna umsita og hava eftirlit við økinum, sum landsstýrisfólkið í delegatiónsskrivið hevur latið Undirvísingarstýrinum, verður ásett, at Undirvísingarstýrið kann nýta persón-upplýsingar úr Kervi+ til umsiting av Kervi+, umsiting av skúlunum, til eftirlit, v.m.

*Til stk. 2*
Ætlanin við hesi heimild er, at landsstýrisfólkið kann gera nærri reglur um, at Undirvísingarstýrið kann nýta persónupplýsingar í Kervi+ til umsiting av Kervi+, umsiting av skúlunum, eftirlit, v.m.

**Til § 5**
Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið, dagfesting.

**Djóni Nolsøe Joensen**
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1:
Fylgiskjal 2:
Fylgiskjal 3: